Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting: 19.01.2026
Mál nr.: 25/08929
Málsviðgjørt: EK/ST

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum broytt við løgtingslóg nr. 152 frá 20. desember 2005, løgtingslóg nr. 38 frá 9. mai 2006 og løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018, verða gjørdar hesar broytingar:
	1. Sum stytt heiti á løgtingslógini verður sett: "(**Dagstovnalógin**)"
§ 2. ... *Stk. 2.* Landsstýrismaðurin hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina av dagstovnaøkinum, og landsstýrismaðurin veitir kommununum yvirskipaða námsfrøðiliga vegleiðing og ráðgeving, sbr. § 3, stk. 3.	**2.** § 2, stk. 2 verður strikað.

Dagstovnaráð **§ 2 a.** Landsstýrismaðurin kann áleggja kommununum í felag innan nærri ásetta freist at seta á stovn eitt dagstovnaráð, sum skal veita kommununum og landi ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum. *Stk. 2.* Dagstovnaráðið kann ráða kommunum og landi til at seta í verk royndarvirksemi, menningarvirksemi og granskingarætlanir viðvíkjandi dagstovnaøkinum. Dagstovnaráðið kann eisini sjálvt taka mál upp. *Stk. 3.* Í Dagstovnaráðnum eru nýggju umboð, sum verða vald soleiðis: 1) Kommunufelagið velur trý umboð, av hesum minst eitt við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið, og eitt foreldraumboð, 2) Mentamálaráðið velur eitt umboð við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið, 3) Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya velur tvey umboð við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið, 4) Føroya Pedagogfelag velur tvey umboð við námsfrøðiligari útbúgving og royndum innan dagstovnaøkið, og 5) Javnstøðunevndin velur eitt umboð. *Stk. 4.* Dagstovnaráðið skipar seg sjálvt og ger sjálvt sínar viðtøkur og sína fundarskipan. *Stk. 5.* Umboðini verða vald fyri eitt trý ára tíðarskeið. *Stk. 6.* Kommunufelagið er skrivstova Dagstovnaráðsins.	**3.** § 2 a og yvirskriftin yvir § 2 a verða strikaðar.
§ 3. Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt og hevur ábyrgdina fyri virkseminum. Dagstovnur sambært hesi lóg er vøggustova, barnagarður, frítíðarheim	**4.** § 3 verður orðað soleiðis: "**§ 3.** Kommunan kann geva børnum, sum búgva í kommununi, tilboð um pláss á

o.a. Dagrøkt sambært hesi lóg er ansing av børnum í heiminum og á spælistovum. *Stk. 2.* Dagstovnar og dagrøktir hava opið gerandisdagar í dagtímunum, men kommunan kann eftir tilmæli frá barnaverndarnevndini geva loyvi til, at dagstovnar hava opið alt samdøgrið ella í vikuskiftunum. *Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um námsfrøðilig stevnumið, starvsfólkasamanseting og virksemið á dagstovnum og dagrøktum.	dagstovni og hevur ábyrgdina av virkseminum. *Stk. 2.* Dagstovnar sambært hesi løgtingslóg eru hesi námsfrøðiligu tilboð: 1) Vøggustovur til børn í aldrinum 10 mánaðir til 3 ár. 2) Barnagarðar til børn í aldrinum 3 ár til byrjan av skúlagongd. 3) Frítíðarstovnar til børn frá forskúla til og við í minsta lagi 2. flokk. 4) Dagrøkt er tilboð í heimi hjá dagrøktara ella í spælistovu. Dagrøkt kann skipast sum partur av samansettum tilboði sambært stk. 4. *Stk. 3.* Kommunan kann í serligum føri gera frávik í omanfyristandandi aldursbýti. *Stk. 4.* Kommunan kann sambært hesi lóg skipa samansett tilboð til børn í aldrinum 10 mánaðir til og við 2. flokk.”
	5. Aftaná § 3 verður sett: “**§ 3 a.** Dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, hava opið gerandisdagar í dagtímunum. Frítíðarstovnar hava opið eftir loknan skúladag. Kommunan ásetur nærri upplatingartíðir fyri dagstovnarnar. *Stk. 2.* Kommunan kann uttan mun til ásetingarnar í stk. 1 áseta, at dagstovnar, undantikið frítíðarstovnar, heilt ella partvíst ikki hava opið ávísar dagar og í skúlafrítíðum, tó í mesta lagi 5 vikur tilsamans um árið, og í mesta lagi 4 samanhangandi vikur. Kommunan kann samskipa tilboð í skúlafrítíðum. *Námsfrøðilig ábyrgd, samstarv og samskipan* **§ 3 b.** Kommunurnar hava dagliga námsfrøðiliga, fyrisitingarliga og fíggjarliga ábyrgd av dagstovnaøkinum. *Stk. 2.* Landsstýrisfólkið hevur yvirskipaðu námsfrøðiligu ábyrgdina og skal seta felags faklig stevnumið og karmar fyri námsfrøðiliga virkseminum.

	§ 3 c. Landsstýrisfólkið og kommunurnar skipa eina Samstarvsnevnd fyri dagstovnaøkið við tí endamáli at fremja felags fakliga menning, samskipan og ráðgeving á lands stigi og kommunalum stigi. *Stk. 2.* Landsstýrisfólkið setur eitt fakligt Dagstovnaráð at ráðgeva Samstarvsnevndini. *Stk. 3.* Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um skipan, manning og virksemi fyri Samstarvsnevndina sambært stk. 1 og Dagstovnaráðið sambært stk. 2.”
	6. Aftaná § 5, men áðrenn yvirskriftina yvir § 6, verður sett: “*Námsfrøðilig og sernámsfrøðilig ráðgeving* **§ 5 a.** Kommunan skal tryggja, at øll dagstovnatilboð í kommununi hava atgongd til námsfrøðiliga ráðgeving til dagstovnar. Ráðgevingin fevnir um námsfrøðiliga vegleiðing, inklusjón og fyribyrgjandi tiltøk, sum hava til endamáls at stuðla starvsfólkum og tryggja trivnað og menning hjá børnum. *Stk. 2.* Landið veitir sernámsfrøðiliga ráðgeving eftir áheitan frá kommunalu ráðgevingini, tá talan er um børn, ið hava serligan ella samansettan tørv. *Stk. 3.* Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um samskipan millum námsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 1 og sernámsfrøðiligu ráðgevingina sambært stk. 2, undir hesum reglur um upplýsingargongd, samstarv og ábyrgdarbýti.”